# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | xx 2020 |
| Mál nr.: | 20/00618-12 |
| Málsviðgjørt: | Elsa Magnussen |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## námsfrøðiligt eftirlit

Við heimild í § 69, stk. 2, í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur verður ásett:

**§ 1.** Henda kunngerð ásetir nærri reglur um eftirlit við tænastum sambært kapitli 5 og 6 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, undir hesum námsfrøðiligt eftirlit.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við innihaldinum av teimum tilboðum og tænastum, ið Almannaverkið, avvarðandi sjálvsognarstovnar og privatir veitarar veita sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella kunngerð við heimild í hesi lóg.
*Stk. 2.* Eftirlitið fevnir um stuðulstænastu, virknistænastu, umlættin og bústaðir.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við:
1) at tilboð og tænastur virka sambært ætlan og virkisætlan, sbrt. § 3, stk. 3 og § 33 í lóg um almannatrygd og tænastur,
2) at bygnaðurin virkar,
3) at búfólk trívast og mennast,
4) at hølisviðurskifti eru hóskandi,
5) at fakliga støðið hjá starvsfólki er nøktandi,
6) at samstarvið við aðrar myndugleikar virkar,
7) at tryggjaðar búfyriskipanir í roynd og veru eru tryggjaðar, og at fyriskipanin er hóskandi, og
8) at inntriv verða framd í samsvari við góðkenning og ásetingar sambært løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.

**§ 4.** Øll neyðug skjøl verða útflýggjað í sambandi við eftirlitið, undir hesum avrit av virkisætlan, tilfar, sum lýsir ætlan fyri avvarðandisamstarvi, avrit av skrivligum klagum um tilboð og tænastur, avrit av fundarfrásagnum frá starvsfólkafundum og annað viðkomandi tilfarð.

**§ 5.** Í sambandi við eftirlitið kann verða skipað fyri samrøðum við búfólk og

persónar, sum fáa tilboð og tænastur sambært § 2, og teirra avvarðandi.

**§ 6.** Eftir hvørja vitjan verður eftirlitsfrágreiðing skrivað.
*Stk. 2.* Eftirlitsfrágreiðingin verður send møguligum borgara- og avvarðandiráðunum til hoyringar.
*Stk. 3.* Endalig eftirlitsfrágreiðing skal latast landsstýrismanninum, Almannaverkinum og ábyrgdarfólki á avvarðandi sjálvsognarstovnum og privatum veitarum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir vitjanina.

**§ 7.** Verður í eftirlitsfrágreiðingini staðfest, at tørvur er á ábótum, kann landsstýrismaðurin áleggja teimum, sum eru nevnd í § 2 innan fyri eina nærri ásetta freist at seta neyðug tiltøk í verk fyri at bøta um umstøðurnar.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin skipar fyri námsfrøðiligum eftirliti sambært hesi kunngerð í minsta lagi annað hvørt ár.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann um neyðugt skipa soleiðis fyri, at eftirlitið verður fingið til vega frá útlendskum, privatum ella almennum veitara.
*Stk. 3.* Eftirlitið kann verða skipað sum fráboðað og ófráboðað eftirlit.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, xx 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen